## Nýggjur prestur í Havn

1. august byrjar klaksvíkingurin, Hanus Simonsen sum avloysaraprestur við Vesturkirkjuna í Havn. Hann kemur fyri Bergur D. Joensen, sum í løtuni er í farloyvi sum prestur. Hanus byrjaði at lesa gudfrøði í Keypmannahavn, men hevur síðani lisið seg lidnan við Menighetsfakultetet í Oslo. Hann fekk prógv fyri góðari viku síðani. Hanus er 28 ára gamal og kemur hetta komandi árið at starvast saman við hinum sóknarprestinum í kirkjuni, Hera Joensen.



## Vatnneyð í Koltri

- Hetta er ein heilt óvanlig støða hjá okkum at vera í. Men sum er fáa vit ikki gjørt annað enn at avlýsa at fáa fólk út í oynna, sigur Lükka Patursson. Nógvi turkurin í seinastuni hevur gjørt, at so lítið vatn er til , at tað er ikki hugsingur um at matgera til ferðafólk, og bara tað at nýta WC fer við so nógvum vatni, at tað er ikki ráðiligt at fáa fólk út í oynna í løtuni. - Vit merktu longu tá fólk fóru avstað í síðstu viku, at tað var um at ganga undan við vatni, og nú er tað so komið hartil, at vit mugu siga ferðafólki frá okkum, sigur Lükka Patursson.

# tlandsferð á bingo



*Tey eru á ferð – á ferð til Skotlands við Norrønu, hjúnini Ingvard og Jóhanna og Halgerð og Gunnar*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*




*Á kortinum sæst, at Nairn liggur stutt sunnanfyri Inverness*

Ingvard er í dag 72 ára gamal, og tá hann gavst hjá Føroya Tele sum 67 ára gamal, hevði hann verið í tænastu hjá telefonfelagnum at kalla alt sítt lív.

- Hann fekk medalju frá Føroya Tele fyri trúgva tænastu hesi mongu ár, leggur Jóhanna aftrat.

Jóhanna hevur arbeitt hjá Nes sóknar Sjúkrakassa í eini 20 ár, men sum ung arbeiddi hon eisini í fiski á Bakkafrost. Hon hevur handilsskúla og skrivstovuútbúgving.

### Skrivstovumaður

Gunnar starvaðist sum bankamaður í eini 11 ár og var skrivari í Argja kommunu í eini 14 ár.

Hann hevur arbeitt sum grannskoðari í hálvt fjórða ár. Í sløk tvey ár starvasðist hann hjá Føroya Fiskavirking – og síðan fór hann í fraktina at arbeiða hjá Faroe Travel.

- Nú arbeiði eg aftur við bókhaldi, sigur hann.

Halgerð hevur eitt nú arbeitt hjá Skipaeftirlitinum.

### Grátt - men gott

Tað var gott veður, klárt og lýtt, hetta mánakvøldið, tá vit nærkaðust Scrabster.

- Vit hava hugt at veðurvánunum á kortinum. Sambært forsøgnini sær tað eitt sindur gráligt út um hesar leiðir teir næstu dagarnar, sigur Gunnar Reynslág.

Men Jóhanna Olsen er optimist.

- Eg vænti, at vit fáa gott veður komandi dagarnar, tí veðrið broytist so skjótt um summarið, leggur hon aftrat.

Vit ynskja teimum fýra eina góða ferð og takka fyri, at vit kundu órógva tey á hesi fyrstu almennu ferðini til Scrabster við Norrønu.



*Sjókaðalin er framleiddur á kaðalverksmiðjuni Nexans í Noreg, og tað er Seløy Dykkerservice sum leggur kaðalin út við skipinum Nautilus Maxi*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Nýggjur kaðal fyri 20 miljónir

**- Nýggi kaðalin millum Skálafjørð og Sund er ein eykapulsæðr á el-netinum, og nýggja 60 kV sambandið hevur eitt nú til endamáls at halda veitingartrygdina á sama høga støði alt árið, sigur Klæmint Weihe, stjóri í SEV**

SEV
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Klokkan 04 í morgun fór norska kaðalskipið Nautilus Maxi undir at leggja ein nýggjan sjókaðal av Raktanga í Eysturoy tvørtur um Tangafjørð og inn á Sandvíkar á Streymoy.

Klæmint Weihe, stjóri í SEV, sigur, at nýggi kaðalin er partur av nýggja 60 kV sambandinum millum verkið í Skálafirði og Sundsverkið.

- Frammanundan bindur ein 20kV kaðal verkini saman, men við nýggja kaðalinum verður trygdin á hesum partinum av netinum hjá SEV nógv størri.

Stjórin sigur, at úr Skálafiðri og úteftir vestursíðuni á Skálafjørðinum liggur nýggi kaðalin í landsvegagerðini, sum er í gond har, og av Sandvíkum og inn á Sund liggur hann saman við rørunum hjá Fjarhitafelagnum.

- Alt hetta er planlagt í góðari tíð, sigur Klæmint Weihe.

Íløgan hjá SEV í henda henda partin av kaðalsambandinum millum verkið í Skálafirði og Sundsverkið er einar 20 miljónir krónur.

Nýggi kaðalin er framleiddur á kaðalverksmiðjuni Nexans í Noregi, og felagið hevur fingið Seløy Dykkerservice at leggja sjókaðalin millum Raktanga og Sandvíkar.

- Nýggi kaðalin er ein eykapulsæðr á el-netinum, og nýggja 60 kV sambandið hevur eitt nú til endamáls at halda veitingartrygdina á sama høga støði alt árið. Hetta hevur eisini týdning, tá árligt eftirlit skal gerast á stóru mastrunum kring um á fjøllunum.

Sev-stjórin væntar, at spenningur verður settur á nýggja el-kaðalin um ein mánaða ella so.

- Veðrið hevur verið gott, og arbeiðið hevur gingið væl, sigur Klæmint Weihe.

Teinurin millum Raktganga og Sandvíkar liggur um stívliga 6 kilometrar.